# Ódámligt við miðsavning

**Jógvan við Keldu, landsstýrismaður við innlendismálum, sigur, at honum dámar ikki, at ætlanir eru um møguliga miðsavning av løgregluni. Hann fer at boða løgmálaráðharranum frá síni misnøgd við tað, sigur hann**

MIÐSAVNAN
*Edvard Joensen*



*Jógvan við Keldu, landsstýrismaður við innlendismálum, fer at venda sær til danska løgmálaráðharran at gera vart við, at honum ikki dámar ætlanirnar um miðsavnan av løgregluni í Føroyum. Men løgreglan er danskt mál burturav, og tí fær hann lítið annað gjørt, sigur landsstýrismaðurin*

Málið um bygnaðarbroytingarnar í løgregluni, sum møguliga fara at flyta partar av løgreglumanningini úr Vágum og Vestmanna til Havnar, er nú komið upp á hægsta politiska stig. Jógvan við Keldu, landsstýrismaður við innlendismálum, fer at venda sær til danska løgmálaráðharran at gera vart við, at honum dámar ikki slíkar ætlanir. Meira fær hann ikki gjørt, tí hetta er danskt mál burturav, sigur Jógvan við Keldu.

Jógvan við Keldu, landsstýrismaður, sigur, at hann kendi ikki til málið, fyrr enn hann las um tað í Sosialinum hósdagin.

Hann hevur síðan gjørt av at venda sær til danska løgmálaráðharran, Lene Espersen, fyri at greiða henni frá síni støðu í hesum málinum. Hann fer i fyrstu syftu at senda løgmálaráðharrnaum eitt bræv og eisini at biða um ein fund um hetta málið.

– Eg veit ikki, hvat tað gevur, tí hetta er danskt mál burturav. Men eg vil gera vart við, at hetta hóvar mær nokk so illa, sigur Jógvan við Keldu.

Han vísir eisini á, at hetta er ikki í samvar við andan í nullhugsjónini í ferðslupolitikkinum, sum nú er løgd fyri tingið. Har verður satsað upp á gott efirlit. Men verða løgreglumenn fluttir úr ymsu økjunum, verður eftirlitið av sær sjálvum veikari. Tað er greitt.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað ber ikki til at sammeta stór og smá lond, tá tosað verður um øki. Tí hóast tað kann tykjast á einum korti, at tað er skjótari at koma út til ymsu økini í Føroyum, enn tað er frá eini sentralari støð í Danmark, er verri enn so altíð, at tað í veruleikanum er so, vísir hann á.

Jógvan við Keldu vísir á, at tað ofta er so, at tá málsøki eru miðsavnað, hava tey víst seg at virka í miðstaðarøkinum, har tey eru løgd. Tað, sum so er eftir, hevur so ongan áhuga hjá centrala fólkinum. Og tað má ikki henda við løgregluni, sigur landsstýrismaðurin við innlendismálum.

Vit eiga altíð at vera varin við miðsavnan, sigur hann.

# Turt gólv á Atlantis

**Kryvjivirkið Atlantis í Vestmanna er nú afturlatið, og einki virksemið verður aftur hjá felagnum, sigur stjórin. Virkið verður nú riggað av**

ALIVINNAN
*Edvard Joensen*

**Vestmanna:**
Í Vestmanna eru nú eini 20 arbeiðspláss færri, enn tey vóru á nýggjárinum. Kryvjivirkið Atlantis er endaliga afturlatið. Maskinur og onnur rakstrargøgn standa enn í bygninginum, men arbeitt verður við at selja tey.

Kreppan í alivinnuni hevur nú latið eitt av størru arbeiðsplássunum í Vestmanna aftur. Alt arbeiðsfólkið er koyrt til hús, sigur stjórin á Atlantis, Jákup Oluf Hansen.

Hann sigur, at enn er so mikið stutt fráliðið, síðan tey góvust at arbeiða, at tey flestu enn eru í ALS skipanini. Men onkur hevur tó fingið annað arbeiði. Onkur er er farin til skips, onkur arbeiðir hjá Vestmanna Kommunu, og onkur annar hevur fingið eitthvørt handverksarbeiði, sigur hann.

Vestmanna Fiskavirking eigur bygningin, sum Atlantis hevur hildið til í, og tí verður nú riggað av. Pakningur og annað leysafæ verður selt, og roynt veðru so eisini at sleppa av við rakstrargøgnini, eins og ruddað verður upp á økinum. Alt skal út. Leigusáttmálin verður so eisini uppsagdur.

Tá alt er avriggað, er so upp til eigararnar, hvat teir fara at gera við bygningin, sigur Jákup Oluf Hansen. Møguleiki er fyri, at annað virksemi fer í gongd. Men tað veru so ikki Atlantis, sum fer at gera nakað meira. Sum skilst á honum, eru útlit fyri, at felagið heilt verður avtikið.

Arbeitt hevur verið til fram til mánaðarskiftið seinasta. Men nú verður so einki aftur av slíkum arbeiði fyrstu fleiri árini. Sjúka í alibrúkunum hevur gjørt, at økið skal liggja stilt, og síðan ganga nøkur ár frá tí, sett verður útaftur, til takast kann.

Jákup Oluf Hansen heldur, at tað man merkjast í Vestmanna, at hesi umleið 20 arbeiðsplássini ikki eru meira.



*Kryvjivirkið Atlantis í Vestmanna er latið aftur, og umleið 20 arbeiðspláss eru nú færri í bygdini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tjóðveldisfólk spyrja um løgreglu

**Tingfólk hjá Tjóðveldisflokkinum bæði á Løgtingi Fólkatingi seta spurningar um ætlanirnar um miðsavnan av løgregluni í Føroyum**

MIÐSAVNAN
*Edvard Joensen*



*Heidi Petersen, løgtingskvinna, hevur boðað frá, at hon á Løgtingi fer at seta Jógvani við Keldu, landsssstýrismanni, fyrispurning um løgregluna í Føroyum. Tað sama hevur Høgni Hoydal á Fólkatingi spurt Lene Espersen, løgmálaráðharra, um*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað hevur vakt ans millum føroyskar politikarar, at fútin arbeiðir við bygnaðarbroytingum í løgregluni í Føroyum. Og serliga tað, at møgulig miðsavnan er við í uppskotinum, hevur fingið politikararnar at vakna.

Heidi Petersen, tingkvinna Tjóðveldisfloksins í Norðstreymoy, hevur boðað frá, at hon fer at seta Jógvani við Keldu, landsstýrismanni við innlendismálum, skrivligan fyrispurning um hetta málið.

Heidi Petersen fer at spyrja landsstýrismannin, um hann er vitandi um ætlaninar hjá donsku løgregluni um at skerja løgregluna í Vágum og at niðurleggja sýslumannsstarvið í Vestmanna og flyta tað til Tórshavnar.

Eisini vil hon vita, um landsstýrismaðurin kann greiða frá, hvørja hugsan hann hevur um hetta mál, og hvørji tiltøk hann vil seta í verk í sambandi við hesa ætlan hjá donsku løgregluni.

Hon spyr framhaldandi, um landsstýrismaðurin heldur tað verða í lagi, at vit í Føroyum ikki hava avgerðarrætt og vald á so týðandi funktión í landinum sum sýslumenn og løgregla hava.

At enda spyr Heidi Petersen Jógvan við Keldu, um hann fer at gera nakað fyri at fáa hetta vald á føroyskar hendur, soleiðis at vit í Føroyum gera av, hvussu vit skipa sýslumenn og løgregluna í landinum.

Eisini á Fólkatingi hevur Tjóðveldisflokkurin tikið málið upp.

Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, hevur spurt danska løgmálaráðharran, Lene Espersen, hvat hon kann uplýsa um tær ætlanir um bygnaðarbroytingar, sum arbeitt veðrur við í løgregluni í Føroyum, og um løgmálaráðharrin kann vátta, at arbeitt verður við øktari miðsavnan og møguliga at leggja niður okkurt av sýslumansembætunum í Føroyum.

Bæði Heidi Petersen og Høgni Hoydal nerta í sínum fyrispurningum við tær uppgávur, sýslumenninir hava umframt at vera vanligur politimynduleiki. Nevnt verður millum annað grindareglugerð, grannastevnur og friðingarmál.



# Ætlar at kæra fútan til løgmálaráðið

**Marjus Dam, løgtingsmaður, sigur, at hann undir ongum umstøðum fer at góðtaka, at tikið verður burtur av løgregluliðnum í Vágum. Hann fer at kæra til løgmálaráðið og ríkispolitiovastan um tað verður neyðugt, sigur hann**

BYGNAÐARBROYTING
*Edvard Joensen*



*Tað hevur vakt mótstøðu, at lagt er upp til bygnaðarbroytingar í løgregluni, sum møguliga fara at minka manningartalið á politistøðini í Vágum niður í helvt. Marjus Dam, løgtingsmaður, lovar at kæra bæði til løgmálaráðið og ríkispolitiovastan, um fútin ikki steðgar slíkum ætlanum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:**
Sambandstingmaðurin í Vágum, Marjus Dam, er ikki fegin um ætlanirnar um bygnaðarbroytingar í løgregluni, sum kunnu hava við sær, at løgregluliðið í Vágum verður skorið niður. Tað fer hann ongantíð at góðtaka, sigur hann.

Marjus Dam er so avgjørdur í síni søk, at hann fer, um tað kemur so vítt, at kæra til fútan í fyrsta umfari, og um fútin ikki steðgar ætlanini, ætlar hann sær víðari til bæði løgmálaráðið og ríkispolitiovastan, sigur sambandstingmaðuriní Vágum.

– Hatta stríðir í móti tí politikkinum, sum sigur, at vit skulu hava so nógv almenn arbeiðspláss sum gjørligt úti kring landið, sigur hann. Flyta vit umsitingina inn í miðstaðarøkið, fylgir fólkið við. So missa vit bæði inntøkur og ikki minst tey fólkini, sum annars høvdu búleikast úti í økinum, vísir hann á.

Hann heldur tað vera heilt við síðuna av, at tað almenna skal ganga undan at miðsavna tænastur sínar.

– Eg síggi sama tendens her sum eitt nú við bankum og slíkum fíggingarsovnum. Teir lata deildirnar kring landið aftur, og samstundis vaksa stór »palass« upp í Havnini.

Marjus Dam undrast á, um hetta kann vera byrjanin til, at ein risastór politistøð kanksa skal byggjast í Havn, og at tað tí verður neyðugt at minka um ella kanska leggja niður støðirnar úti á bygd.

– Tað átti heldur at verið soleiðis, at tær smáu bygdarstøðirnar vórðu víðkaðar. Bæði við plássi og fólki, sigur Marjus Dam.

### Yvirgangur

Allur vesturheimurin ristir í brókunum fyri tí yvirgangi, sum nær sum helst kann raka londini. Trygdin verður herd allastaðni, vísir Marjus Dam á. Men ikki her hjá okkum. Her ætla vit tað øvugta, sigur hann.

Hann vísir á, at tað ferðast heilt nógv fólk um flogvøllin í Vágum, og at talið bara veksrur. Tað setir eisini krøv til trygdina. Og tað metir hann ikki, at ein flyting av løgreglufólki úr Vágum til Havnar hjálpir uppá.

Gamaní er tað rímiliga skjótt at koma úr Havn vestur í Vágar, tá okkurt er áfatt. Men tað er altso skjótari at koma úr Miðvági á flogvøllin, enn úr Havn. Og eisini her, eins og við eitt nú sjúkraflutningi, er tað umráðandi við skjótari hjálp, tá eitthvørt er áfatt.

– Vit frætta bara um útbygt rutunet úr Vágum, sigur Marjus Dam. Bæði Bretland, Noreg og nú eisini Italia eru komin afturat seinastu árini. Hvat kann ikki koma hendanveg av bæði rúsevnum og øðrum slíkum? spyr hann. Gamaní hava vit tolleftirlitið - enn - á flogvøllinum. Men vit eiga avgjørt ikki at svekka løgregluna, sigur hann. Tí hesir báðir, tollarin og politisturin, eiga at arbeiða saman og soleiðis gerast tað sterkari.

### Luktar illa

– Hetta luktar illa av miðsavnan og hevur eftir mínum tykki einki sum helst við rationaliseringar at gera, sigur Marjus Dam. Eg nokti at góðtaka tað argumentið, at talan er um at fáa meira fyri pengarnar, sum tøkir eru, sigur hann.

Hann heldur tað vera løgið, at bara tað, sum liggur í Havn, skal vera rationelt. Tað er at niðurgera tað, sum liggur uttan fyri Havnina, sigur hann.

Tað er líka skjótt at koyra úr Vágum til Havnar, sum tað er at koma hinvegin. Og í Vágum er brúk fyri løgreglu á flogvøllinum fleiri ferðir um dagin, við teirri nógvu flogferðsluni, sum er. Ikki minst í hesum Schengen tíðum, vit nú liva í, sigur hann.

Tað mátti tískil verið meira rationelt at latið fólk farið nakrar fáar ferðir úr Vágum til Havnar, tá tørvur var á tí har suðuri, heldur enn at koyra hvønn dag vestur í Vágar.

Tað stendur í samgonguskjalinum, at flogvøllurin í Vágum skal byggjast út. Og róð varð fram undir hetta á fundinum, sum løgmaður her fyri hevði við danska forsætisráðharran. Vónandi fæst ein skjót loysn á tí málinum, sigur Marjus Dam. Og tá verður upp aftur meira brúk fyri løgreglu á flogvøllinum, vísir hann á.

– Eg góðtaki ikki, at politistøðin í Vágum tódnar. Eg vil forða fyri, at góð og vælvirkandi arbeiðspláss verða smoygd út gjøgnum bakdyrnar, proklamerar Marjus Dam, sambandstingmaður í Vágum. Vit skulu heldur byggja smáu politistøðirnar út tekniskt, sigur hann.

# Sjúkraflutningurin verandi í Vágum

**Landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum ynskir, at sjúkrafútningurin í Vágum eisini í famtíðini verður røktur úr Vágum. Hann fer at biða løgtingið um játtan til hetta**

SJÚKRAFLUTNINGUR
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
Útlit eru nú fyri, at málið um sjúkraflutningin í Vágum verður loyst við, at ein avtala verður gjørd millum Almanna- og Heilsmálaráðið og Vága Bjargingarfelag um hesa tænastuna.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum, sigur, at hann fer at biða løgtingið játta 350.000,- krónur seinna halvár í ár til at røkja sjúkraflutningin úr Vágum fyri.

Ætlan landsstýrismansins er at gera eina skipan, har eitt ávíst tal av portørum verða settir í starv í Vágum til at røkja sjúkraflutningin burturav, sigur Hans Pauli Strøm. Vága Bjargingarfelag skal so umsita hesa skipanina, sigur hann. Skipanin fer væntandi at kosta einar 700.000,- krónur árliga.-

Hans Pauli Størm sigur, at hann nú fer at heita á Landssjúkrahúsið um at taka upp samráðingar við Vága Bjargingarfelag um endaligu avtaluna. Tá verða smálutir avtalaðir. Har í millum eisini, hvussu nógv fólk talan verður um.

Málið hevur í samband við fíggjarlógarviðgerðina verið hjá Trivnaðarnevndini vil viðgerðar, og hon hevur viðmælt at seta helvtina av kostnaðinum av í ár. Út frá tí skilst so, at skipanin fer at halda fram, og at kostnaðurn verður mettur til tær 700.000,- krónurnar, landsstýrismaðurin hevur nevnt.

Vága Bjargingarfelag hevur á sjálvbodnum grundarlagi í áravís røkt sjúkraflutningin úr Vágum. men nú ynsktu teir, sum hava røkt hesa tænastuna, at fáa eina fasta skipan, har teir millum annað eisini fingu løn fyri ta tíðina, teir vóru bundnir av sínum vaktum. Eftir gomlu skipanini fingu teir bert løn, meðan teir fysiskt vóru í bilinum. Ikki meðan teir annars vóru bundnir við telefonina.




*Sjúkrabilar úr Havn koyra javnan sjúklingar til og frá flogvøllinum. Hesa tænastu halda teir, sum koyra í Vágum, at teir eisini kunnu røkja, um flutningurin verður lagdur í fasta legu við føstum portørum í Vágum*
*Mynd: Edvard Joensen*